# *Serarbeiðarasáttmálin*

# Serarbeiðarasáttmáli.

Vísandi til §13 í høvuðssáttmálanum og ásannandi at arbeiðsmynstur, sløg av arbeiði og neyðugar dygdir alsamt broytast, eru partarnir komnir ásamt um at gera hendan serarbeiðarasáttmála til tess at tryggja eina skikkaða arbeiðsmegi fyri serstøk arbeiði og ein meira liðiligan arbeiðsmarknað.

## §1.

Fyri handlig arbeiðir, sum ikki eru serliga nevnd í §1 til 4 í høvuðssáttmálanum, og sum krevja venjing og útbúgving, eru hesi fevnd av serarbeiðarasáttmálanum.

- Hópframleiðsla av betonelementum, alminiums- og plastvindeygum, pakkitilfari, rútaglasi, glastrevjalutum og bygningelemntum.
- Montering av stál-, beton- og timburelementum og onnur monterinsarbeiðir. Uppesetan av stilladsum.
- Áleggjan av takpappi og gólvbelegningi.
- Forskalling av kasettuformum, uppsetan av kantsetinum og áleggjan av betongflísum, legging av kloakkrørum.
- Arbeiði í timburhandlum við rammusagum, høvlum, plátusagum, kantfresarum og rundsagum í samband við tilgerð av plátum og timbri til útflýggjan.
- Viðlíkahald, umvælingar og stillingar av amboðum og maskinum.

## §2.

Lønin fyri frammanfyri nevndu arbeiðir verður ásett soleiðis:

Tímaløn 1. árið – ið verður at rokna sum yrkisvenjing: Sambært §1a. Tímaløn 2. árið og síðan – við yrkisvenjing sb. arbeiðsgevaraváttan: Sambært §1a + 2,25 kr./tíma. Fastløntir serarbeiðarar við yrkisvenjing verða løntir sambært §1a + 2,25 kr./tíma ferðir 173,33 tímar um mánaðin.

Aldursmarkið fyri at byrja yrkisvenjing er 18 ár.

## §3.

Miðað verður ímóti at skipa fyri ástøðiligari og handligari frálæru fyri tey ymisku serarbeiðaraøkini, tá møuleikar eru til tess.

## §4.

Hesin sáttmálin forðar ikki fyri, at samstarvið millum arbeiðsmenn, serarbeiðarar og handverkarar verður at praktisera, sum tað higartil hevur verið á teimum ymsu arbeiðsplássunum og í teimum ymsu arbeiðunum.

## §5.
Har serstakar ásetingar ikki eru gjørdar í hesum sáttmála, fylgja partarnir høvuðssáttmálanum, sum er galdandi partanna millum.

## §6.
Hesin sáttmáli tekur við 1. mai 1996. Viðvíkjandi uppsøgn fylgir hann høvuðssáttmálanum.

**Protokollat:**

Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hinumegin eru í sambandi við, at serarbeiðarasáttmáli er undirskrivaður, samd um, at arbeiðsgevari skal hava skyldu til at geva arbeiðaranum skrivliga váttan um, nær yrkisvenjingin er byrjað og hvussu leingi viðkomandi hevur starvast í arbeiði, sum telur við sum yrkisvenjing.

Partarnir seta í felag upp orðingina av slíkari arbeiðsgevaravváttan. Arbeiðsgevari hevur ikki skyldu til at geva arbeiðsgevaravváttan fyri arbeiði, sum samanhangandi ikki hevur vart í minsta lagi 6 vikur.